## Bendtner koyrdi útav við 160 km/t

Danski Nicklas Bendtner er aftur sloppin í yvirskriftirnar á ensku tabloid-bløðunum. Hera ferð er orsøkin, at 21 ára gamli danin mundi komið heilt galið avstað, tá hann sunnudagin var farin biltúr. Í flotta Aston Martin-bilinum koyrdi Bendtner út av vegnum, meðan hann koyrdi 160 km/t, men sambært Ekstra Blaðnum slapp Bendtner tó frá óhappinum uttan stórvegis mein.



## Ónøgdur um 50 milliónir

Tað var ein fátøk troyst hjá Tiger Woods, at hann um vikuskiftið gjørdist 50 milliónir krónur ríkari. Hetta var nevnliga vinningurin fyri at gerast nummar tvey í ársins útgávu av FedEx-tour'inum, har Phil Mickelson gjørdist nummar eitt. – Eg eri eitt sindur vónbrotin um, at tað ikki eydnaðist mær at vinna, men um nakrar dagar er lagið hjá mær helst betri, staðfesti Woods eftir seinastu kappingina.

# VB/Sumba og B71 flyta upp

**Við hvør sínum sigri tryggjaðu VB/Sumba og B71 sær leygardagin, at tey verða nýggju liðini í Vodafonedeildini komandi ár. Enn er framvegis púra opið, hvør fer niður saman við MB, tí har eru ikki færri enn trý lið um boðið**



einsistur@kallnet.fo
Hilmar Jan Hansen




MB hevur í ár verið veikasta liðið í 1. deild, og tað var eisini avmarkað, hvat miðvingarnir megnaðu at gera við VB/Sumba, sum við tryggum 4-0 sigri staðfesti oddastøðuna í deildini

Mynd: Dagfinn Olsen

Hóast eitt umfar framvegis er eftir, so varð leygardagin endaliga greitt, hvørji tvey lið flyta úr 1. deild og upp í Vodafonedeildina komandi ár. Bæði VB/Sumba og B71 vunnu, samstundis sum TB tapti, og so var greitt, at bara tvey lið vóru eftir heilt har frammi. Nú stendur bara eftir at vita, hvat av teimum báðum vinnur gullið og hvat má taka til takkar við silvurinum.

Tað var annars í farnu viku líkt til, at TB av álvara ætlaði at melda seg inn í kappingina um at flyta upp, tá í Vági eydnaðist at basa VB/Sumba. Men meiri enn tað rakk tað ikki til, og tí er TB nú bara eftir í kappingini um bronsuna, eitt stig aftan fyri HB, ið ikki kann flyta upp.

At uppflytingin nú endaliga er avgreidd, merkir samstundis, at tey í Vági og á Sandi komandi kappingarár kunnu gleða seg til dystir í bestu mansdeildini. Í hesum umfarinum hevur B71 bara verið niðri og vent hetta kappingarárið, meðan tað VB/Sumba hevur havt ein steðg frá toppfótbóltinum í tvey ár.

### Málríkt á Toftum

Dysturin leygardagin hjá VB/Sumba, sum var á heimavølli, átti annars at verið ein av teimum lættaru, tí mótstøðuliðið var MB, ið bara hevur átta stig og langt síðani er farið niður. Men kortini eydnaðist ikki heimaliðnum at fáa hol á, fyrr enn nakrir minuttir vóru farnir av seinna hálvleiki. So gekk eisini slag í slag, og tá avtornaði, hevði VB/Sumba vunnið ein tryggan 4-0 sigur.

Heilt so trivaligur var sigurin hjá B71 ikki, tá sandoyingar vóru í Gundadali og vitjaðu HB. Tó fekk B71 eina ynskibyrjan við máli longu í øðrum minutti, og allan fyrra hálvleik, meðan tað enn var spælandi, vóru gestirnir eisini við yvirlutan. Í seinna hálvleiki versnaði veðrið og spælið tilsvarandi, so einki mál kom aftrat í dystinum, sum B71 vann 1-0.

Ólíka málríkari var dysturin á Toftum, har Víkingur var og vitjaði B68, tí ikki færri enn átta mál. Í fyrra hálvleiki fingu liðini tvey í part, men fyrsta korterið av seinna hálvleiki gjørdi Víkingur bart, skoraði trý mál og vann til síðst 5-3. Sigurin kundi verið enn størri, tí eitt nú brendi Víkingur brotsspark, tá støðan enn var 0-0.

### Botnspenningur

Tey bæði eysturoyarliðini, sum møttust á Svangaskarði, hava tað til felags, at tey eru bjargað frá niðurflytingarvanda, men øðrvísi er hjá hinum báðum, NSÍ og Skála, sum spældu í Runavík. Har kom einki mál fyri steðgin, men í seinna hálvleiki skoraði Skála tvær ferðir, umframt at málverjin hjá NSÍ eftir tað fekk reyða kortið í sambandi við eitt brotsspark, sum Skála enntá brendi.

Triði niðurflytingarkandidaturin er FC Hoyvík, sum nokk so óvæntað fekk ein sigur í land ímóti TB, ið harvið misti sín uppflytingarmøguleika. Einsamalli málskjúttin hjá hoyvíkingum var enntá ein vágbingur, men annars var einki at siga til sigurin, ið var so mikið sannførandi, at FC Hoyvík var nærri at økja, enn TB var at javna.

Sum sagt, er bert tað eina umfarið eftir, og á pappírinum hevur FC Hoyvík helst besta møguleikan at yvirliva, tí liðið skal til Miðvágs. Ólíka torførari er hjá NSÍ og Skála, sum skulu møta ávikavist B71 úti og VB/Sumba heima. Hinir dystirnir í seinasta umfarinum eru TB-B68 og Víkingur-HB.

### Úrslit, 26. umfar

**VB/Sumba-MB 4-0 (0-0)**
**1-0:** Hartman Hansen
**2-0:** Hartman Hansen
**3-0:** Teitur Tausen
**4-0:** Jón Krosslá Poulsen

**HB-B71 0-1 (0-1)**
**0-1:** Ikechuckwu Onyema

**FC Hoyvík-TB 1-0 (0-0)**
**1-0:** John T. Poulsen

**B68-Víkingur 3-5 (2-2)**
**0-1:** Bárður Hansen
**1-1:** Oddur Højgaard
**1-2:** Martin Olsen
**2-2:** Súni Fríði Barbá
**2-3:** Bárður Hansen
**2-4:** Bárður Hansen
**2-5:** Sonni Dalheim
**3-5:** Oddur Højgaard

**NSÍ-Skála 0-2 (0-0)**
**0-1:** Bárður Danielsen
**0-2:** Petur Pauli Mikkelsen

# B71 má hava styrk

**– Tað er truplari hjá smærru feløgunum at standa seg í bestu deildini, tí tá onkrir góðir spælarar koma undan, er stórur vandi fyri, at onnur feløg nokk so skjótt fara við teimum, sigur Eli Hentze, sum ikki heldur fram sum venjari hjá B71, tá liðið spælir í Vodafonedeildini komandi ár**

Eftir eitt kappingarár, har B71 kanska kom heldur seint í gongd, var innsatsurin leygardagin krýndur við uppflyting, so Sandoyggin aftur komandi ár er partur av Vodafonedeildini. Nú stendur so eitt stórt arbeiði fyri framman, so besta mansliðið hjá B71 skal vera so væl fyri, sum tað ber til, tá kappingini komandi ár fer í gongd.

– Fortreytirnar fyri at standa seg í bestu deildini eru so nógv broyttar seinnu árini. Tað er truplari hjá smærru feløgunum, tí tá onkrir góðir spælarar koma undan, er stórur vandi fyri, at onnur feløg nokk so skjótt fara við teimum, sigur Eli Hentze, sum hevur vant B71-liðið síðstu tveir mánaðirnar.

– Skal eg siga tað stutt, so er núverandi liðið ikki nóg sterkt til at standa seg og verða verandi í Vodafonedeildini. B71 má hava onkrar meira royndar spælarar aftrat á ávísum plássum, skal tað eydnast at halda sær uppi í bestu deildini.

### Nýtt fólk krevst

Umframt, at B71 skal út at finna onkrar spælarar, sum kunnu styrkja um liðið, verður í øllum førum neyðugt hjá felagnum at finna ein nýggjan venjara.

– Tá eg tók við, segði eg, at eg fegin vildi taka eitt tørn fyri felagið í 2009, men ikki í 2010. Ein orsøk til tað er, at eg haldi, at tað riggar ikki ordiliga væl, at tú ert venjari hjá einum felag í bestu deildini í Føroyum, samstundis sum tú hevur eitt annað fulltíðarstarv, sigur Eli Hentze.

Hóast veðrið ikki var tað besta, var fitt av fólki og hugdi at dystinum hjá B71 ímóti HB leygardagin, og tað fløvaði, viðgongur venjarin, sum sigur seg hava havt fleiri góðar løtur í júst Gundadali.

– Tað hevur ferð eftir ferð víst seg, at tá avgerandi dystir hava verið hjá B71, so hava teir eisini verið í Gundadali, og soleiðis skuldi tað eisini verða hesa ferð, sigur Eli Hentze.

hil